


## Roskilde misti sigurin í seinna hálvleiki

Roskilde hevði eina trygga 2-0 leiðslu í steðginum. Atli Danielsen spældi allar 90 minuttirnar, tá FC Roskilde á útivølli í Norður-Jútlandi spældi javnleik 2-2 ímóti Skive. Støðan í hálvleikinum var 2-0 til Roskilde, og tá sá út til, at Atli og liðfelagarnir skuldu fáa sín fyrsta sigur í næstbestu donsku fótbóltsdeildini hetta kappingarárið. Jesper Håkanson legði Roskilde á odda 1-0 og økti til 2-0 seinastu løtuna í fyrra hálvleiki. Ì seinna hálvleiki hevði Roskilde nóg mikið av málmøguleikum til at økja um leiðsluna. Men ístaðin gjørdist tað Skive, sum fekk minkað um munin tíðliga í seinna hálvleiki. Stutt undan dystarenda fingu Atli og liðfelagarnir eitt brotsspark dømt ímóti sær, sum teir vóru stak illa nøgdir við. Lokala blaðið í Skive, Skive Folkeblad skrivar eisini, at talan var um eitt dómaramistak, sum gav heimaliðnum tað eina stigið. Skive gjørdi sær dælt av møguleikanum, og settu brotssparkið í netið. Soleiðis fóru tvey stig í vaskið hjá Roskilde. Roskilde hevur nú eitt stig aftaná fýra dystir.




*Eins og Pál Joensen, so vil Miilaraaraq Lennert sleppa til OL*

# Grønland stríðir sítt OL-stríð

**OL** Grønland eigur ung, evnarík ítróttarfólk í vetrarítróttargreinum, sum kunnu umboða Grønland til heimsmeistarakappingar, men sum eru noydd at fara undir Dannebrog, tá olympisku vetrarleikirnir eru á skránni

Heri Simonsen

Millum tey stóru grønlendsku vetrarítróttar-talentini er tann ungi kvinnuligi skíðskjótingar-íðkarin, Miilaaraq Lennert, sum veruliga gjørdi vart við seg í fjør, tá hon í tveimum førum gjørdist nummar trý í tí svenska meistaraskapinum fyri juniorar. Bæði í 7,5 kilometurs sprinti, og í 10 kilometurs jaktstarti. Eins og Pál Joensen droymir tann unga Miilaaraq Lennert at umboða sítt land til OL, men sum er, so mugu grønlendingar undir Dannebrog, tá olympisku vetrarleikirnir eru á skránni. Miilaaraq Lennert vónar at kunna sleppa til vetrar-OL í 2014, sum verður í Russlandi. Uiloq Slettemark og Øystein Slettemark eru tveir grønlendskir skíðskjótingaríðkarar, sum hava umboðað Danmark á olympiskum vetrarleikum. Tey hava ikki verið við heilt har frammi, men hava fingið góð persónlig úrslit.

### Danmark er veikt á vetrar-OL

Trupuleikin hjá grønlendsku vetrarítróttar-íðkarunum er, at landið – ella ríki - tey mugu umboða til OL hevur eina ógvuliga veika siðvenju, tá tað kemur til vetrarítrótt. Danmark hevur gjørt nærum ongar skreytir í tí vetrarolympisku søguni sammett við Noreg, Svøríki og Finnland, sum hava vunnið eitt ótal av vetrar-OL heiðursmerkjum. Danska, olympiska nevndin leggur tó herðslu á, at Danmark eigur at verða við til olympisku vetrarleikunum, hóast danskur vetrarítróttur er á einum lágum støði, og vandi er fyri, at ógvuliga fáir danskir íðkarar fara at klára kravtíðirnar til vetrar-OL í framtíðini. Danska olympiska nevndin ger vart við, at tað er týdningarmikið at vísa seg til tey stóru høvini.

### Búð og vant í Svøríki

Miilaaraq Lennert hevur búð og vant í svenska býnum, Torsby, og var á heimavølli, tá hon gjørdi vart við seg, tá svenska meistaraskapið í skíðskjóting fyri juniorar var á skránni. Hinir kendu skíðskjótarnir úr Grønlandi, Uiloq og Øystein Slettemark hava ættarbond til Noregs, og hava leitað nógv tann vegin í samband við venjingar. Tá tað kemur til fjallalendi og veðurlag til vetrarítróttargreinir, so hevur Grønland tað sum skal til, meðan Danmark av givnum orsøkum ikki kann spæla við á hesum økinum.

### Vilja luttaka sjálvi

Fyri Grønland snýr spurningurin seg um møguleikan hjá grønlendskum ítróttarfólkum at sleppa til olympisku vetrarleikirnar umboðandi Grønland. Tað verður kjakast nógv um hetta málið í Grønlandi. Men grønlendingar standa við somu trupuleikastøðu, sum føroyingar, og tí mugu teirra ítróttarfólk inn gjøgnum dyrnar hjá dønum, fyri at sleppa til OL. Grønlendska ítróttarsambandið hevur tó ynskt, at ein grønlendskur íðkari sum lýkur olympisku krøvini skal sleppa til vetrar-OL. Tó hava grønlendingar valt at sagt, at um danska olympiska nevndin ikki úttekur ein danskan íðkara, sum hevur betri kravtíðir, enn tann grønlendski íðkarin, so eigur tann grønlendski íðkarin heldur ikki at sleppa at umboða danska ríkið á teimum olympisku vetrarleikunum. Grønlendingar eru tó sínir egnu harrar, tá talan er um teir arktisku vetrarleikirnar, har teir kappast við Sámaland, Nunavut, Alaska og aðrar arktiskar javnlíkar. Sama er til heimsmeistaraskap og aðrar kappingar, júst sum støðan er hjá føroyskum íðkarum. Olympiski dreymurin livir í Grønlandi, men har stríðast tey, sum sagt eisini við at umseta henda dreymin til veruleika

*heris@sosialurin.fo*